# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein sólskinssøga

Tær eru ikki nógvar í hesum myrku døgum – sólskinssøgurnar. Men tær eru har. Ein teirra sá dagsins ljós í føroyska miðlaheiminum í gjár. Samskiftis- og KT fyritøkan Føroya Tele hevur við síni SHEFA kaðalsverkætlan framt spennandi nýbrot í føroyskum vinnulívi. Vit hugsa her fyrst og fremst um hjávinningarnar, har SHEFA hevur latið upp dyr til altjóða oljuvinnuna og til eitt samstarv við samskiftisvinnuna í Bretlandi.

Søgan er stutt henda. Tá farið varð undir at betra telesamskiftið millum Føroyar og umheimin við nýggjum fipurkaðali varð eisini latið upp fyri nýggjum vinnumøguleikum við tilknýti til júst hesa kaðalsverkætlan. Oljupallar og oljuframleiðsluskip vestan fyri Hetland hava higartil samskift um fylgisvein. Hetta kann vera svikaligt og eisini kostnaðarmikið. Hví ikki binda oljuleiðirnar í SHEFA kaðalin! Sum hugsað so varð gjørt. BP, sum stendur fyri oljuleiðunum vestan fyri Hetland, varð boðið uppí verkætlanina, og felagið sá so stórar møguleikar í henni, at tað legði 100 mill. kr. á borðið fyri at knýta sínar oljuleiðir uppí føroyska kaðalin. Tað er ikki bara sum at siga tað at fáa beinið inn um hjá stóru oljufeløgunum, men her hava so skil, treiskni og tol vunnið á tí ókenda, og í gjár fekk Føroya Tele so grønt ljós frá British Petroleum at kunna um stóru verkætlanina. Hon var ikki bert sloppin gjøgnum nálareygað, hon varð eisini góðkend sum ein professionell og profitabul verkætlan, ið BP fegið vildi leggja navn til.

Ikki nóg mikið við tí. Føroya Tele fór eisini undir samráðingar við enn ein bretskan vinnurisa, nevniliga British Telecom og rætti eisini honum eina hjálpandi hond við at lata hann brúka SHEFA í samskiftinum millum oyggjabólkarnar fyri norðan, Hetland og Orknoyggjar og skotska meginlandið.

Eftir hesar báðar væleydnaðu landvinningar hómast eisini aðrir nýggir og spennandi møguleikar úti í havsbrúnni. Oljufeløg, sum arbeiða í Norðsjónum, hava fingið frænir av SHEFA loysnini og umhugsa nú eina líknandi loysn fyri teirra oljupallar. Umhugsað verður at leggja fipurkaðal millum pallar og so SHEFA-støðirnar á landi í antin Hetlandi ella Orknoyggjum.

Tað stutta av tí langa er, at SHEFA kaðalsverkætlanin, sum upprunaliga "bara" skuldi tryggja samband millum Føroyar og umheimin, orsakað av góðum fólkum og egnum innovativum arbeiðsumhvørvi, er vorðin ein katalysatorur fyri víðari nýhugsan og menning. At ein eftir altjóða mátistokki lítil føroysk fyritøka hevur megnað at fáa sínar tænastur blástemplaðar hjá BP og BT kann seta ringar í sjógvin.

Eitt lyklaorðið í hesum er støddin. Skal føroysk fyritøka megna slíka uppgávu má hon hava eina rímuliga stødd, og tað hevur Føroya Tele. Enn eitt lyklaorð er vitan og royndir. SHEFA er so eitt dømi um júst hetta, har FT-umhvørvið hevur valt sjálvt at vera partur av menningini við samskipan heldur enn at lata øðrum uppgávurnar. Tað skapar eitt føroyskt know how, sum upp á sikt kann gerast júst lykil til nýggj fram- og nýbrot.

**Sosialurin**

## Politikarar bjargið Kringvarpinum



**JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD**
rithøvundur og journalistur
Justinus@olivant.fo

Í gjár var eg inni eini ørindi í deildini hjá Kringvarpinum, sum tekst við sjónvarp. Hetta var nakað undan Degi og viku og starvsfelagar stríddust. Tungt lag hekk í luftini. Leiðslan í Kringvarpinum var á fundi, og avgerð skuldi takast um, hvønn háls skarprættaraøksin skuldi medda til og skilja høvd frá buli. Í so máta er stemmningurin í Kringvarpinum ikki øðrvísi enn á øðrum arbeiðsplássum kring landið, og tað er ikki tí eg skrivi hesar reglur. Tað er eins svárt at verða uppsagdur í Kringvarpinum, sum á Kósini.

Eg fari at heita á løgtingsmenn út frá einum fólkaræðisligum sjónarhorni at loyva Kringvarpinum at hækka lurtara- og hyggjaragjaldið soleiðis, at stovnurin kann rekast við verandi manning, og tá ið tíðirnar aftur fara at batna við øktari manning.

Kringvarpið er ein almennur miðil, og fremsta uppgávan hjá hesum loftmiðli er júst at ansa eftir at løggevandi, útinnandi og dømandi vald gera sum tey eiga at gera. Eitt veikari kringvarp gevur politikarum størri rásarúm til vanstýring.

Gera okkara løgtingsmenn karmarnar ovtrongar hjá kringvarpinum at virka undir, tá minkar orkan hjá kringvarpinum at ansa eftir politikkarunum og tað er vandamikið fyri fólkaræðið og kann flyta okkum til tilstandir, sum minna um einaræði.

Kringvarpið hevur í allari neyðini boðað frá, at teir fara at royna at økja um lýsingainntøkurnar. Hetta er serdeilis vandamikið fyri ein almennan fjølmiðil, hvørs høvuðsendamál er at fremja fullkomiliga óheftan tíðindaflutning og at virka sum fjórða statsmaktin saman við tí løggevandi, útinnandi og tí dømandi.

Og hetta er serdeilis óheppið fyri miðlar sum ikki geva seg út fyri annað enn at vera privatir, og so sum verða riknir á handilsligum grundarlag. Ein alment stuðlaður stovnur kappast við privatar um lýsingar inntøkur er grundleggjandi skeivt.

Tess meira Kringvarpið er bundið at lýsingainntøkum tess fastgrónari gerst illgrunin um, at lýsarin kann stýra stovninum. Tað er nóg ringt í dag, nú ein triðingur av inntøkunum hjá Kringvarpinum eru frá spæli og lýsingum. Nú veit eg væl, at mínir starvsfelagar vilja loypa upp úr stólinum og rópa, at slíkt kemur als ikki upp á tal. Eg sigi heldur ikki, at tað hendir, eg sigi bara at illgrunin er har. Og tað er lætt at hugsa, at ongin sagar greinina av, hann situr á.

Um lýsingainntøkan gerst ov stórur partur av inntøkunum hjá Kringvarpinum, tá hendir tað lætt, at journalistar, sum hava bein í nøsini og sum ikki vilja stýrast av nøkrum, gerast óbrúkiligir í einum kommersiellum Kringvarpi, og tað er enn ein hóttan móti fólkaræðinum.

Góðu løgtingsmenn í samgongu og andstøðu. Tit gera tykkum sjálvum eina bjarnatænastu við at gloyma Kringvarpið í hesi sváru tíð. Minni eftirlit er við tykkum, tess størri eru sannlíkindini fyri at tit ikki gera tykkara arbeiði til fulnar.

Eg trúgvi, at veljarans álit á tykkum økist, um tit syrgja fyri, at vit hava ein sterkan almennan miðil, sum er høgt hevjaður yvir at verða bundin av nøkrum sum helst og serliga ikki vælvild frá peningasterkum privatum fyritøkum. Tess størri gjøgnumskygni er í politiska arbeiðinum, tess betri samfelag.

Vit hava ongantíð meira tørv á einum sterkum og óheftum Kringvarpi enn júst í krepputíðum.

## Breiðpolitisk semja um veðurlagssáttmála

**POUL MICHELSEN OG BJØRT SAMUELSEN**
løgtingslimir

Uppgávan at minka um $CO_2$-útlátið og at gera føroyska búskapin óheftan av oljuni, er ein hin týdningarmesta fyri land og framtíð okkara, og má loysast við breiðum semjum, ið røkka skulu nógv ættarlið fram í tíðina.

Heimsins leiðarar kjakast ikki longur um hvørt nakað skal gerast, fyri at minka um útlátið av $CO_2$ til tess at steðga ógvusligu veðurlagsbroytingunum, men hvat, ið gerast skal, og hvussu ein heimssemja kann finnast.

Undirritaðu umboðaðu ávikavist samgonguna og andstøðuna á veðurlagsráðstevnuni í Poznan í farnu viku. Yvirlýsingarnar frá londunum vóru ymiskar, men ein felags boðskapur var: Londini taka avbjóðingina í allar størsta álvara!

Tað skal Føroyar sjálvandi eisini gera, og eiga vit tí at vera beinleiðis við í tilgongdini til veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn í 2009.

**Politiska skipanin má tí sum skjótast taka støðu til:**

- Hvat okkara mál skal vera fyri niðurskurð av $CO_2$-útlátinum
- Hvørji átøk í tí almenna og í vinnuni mugu fremjast
- Hvussu vit stimbra undir eina varandi orkuvinnu
- Hvussu nógvar pengar vit seta á fíggjarlógina til hesi átøk
- Hvussu ein ítøkilig langtíðarætlan fyri økið sær út

Umframt at vit sum land vilja taka okkara part altjóða ábyrgdini at minka $CO_2$-útlátið, so vilja vit eisini gera okkara búskap so óheftan av oljuni, sum til ber. Í einum oyggjasamfelag har regn, vindur, aldur og sól verður okkum tillutað í ríkiligan mun, hava vit sera góðar møguleikar at menna eina vinnu, sum byggir á varandi orkukeldur. At stimbra undir ein ídnað við varandi orku, krevur íløgur her og nú. Neyðugar íløgur, sum í ríkiligan mun verða bornar samfelagnum og vinnuni aftur í framtíðini.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.